gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Trupul seming

Tað er einki at ivast í, at formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag hevur rætt, tá hon segði við Sosialin ígjár, at semingsmenninir fáa eina trupla uppgávu, tá teir skulu royna at fáa semju millum fakfeløgini og arbeiðstakararnar, tí partarnir standa so langt frá hvørjum øðrum.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum samráðast saman, krevja 20 prosent meira í løn, men tað ljóðar, at arbeiðstakararnir vilja ikki lata 10 prosent í einum tvey ára longum sáttmála. Grundarlagið fyri kravinum er, at keypiorkan er fallin meiri enn 10 prosent tey seinastu tvey árini.

Frammanundan hevur høvuðsfelagið á almenna arbeiðsmarknaðinum, Starvsmannafelagið, fingið 12,5 prosent í løn og eftirlønhækking tilsamans. Sjálvur lønarvøksturin er roknaður til 7,5 prosent, og arbeiðarafeløgini fara neyvan at góðtaka nakað, sum er niðan fyri hesi prosent.

Harafturat mugu arbeiðstakararnir fyrr ella seinri góðtaka kravið um løn eftir starvsaldri. Ingeborg Vinther, formaður í FA, hevur rætt í tí, at ein royndur arbeiðari eigur at fáa meira í løn, enn ein, sum kemur óroyndur í eitt starv. Men so er spurningurin, hvussu og hvørjar royndir skulu telja við ella ikki.

Tað ljóðar kanska av so nógvum, at løntakarar hava fingið eini 7-8 prosent í lønarhækking í tvey ára sáttmála, men í grundini er ikki talan um stóran lønarvøkstur, tí keypiorkan er fallin so nógv.

Harafturat er ein lønarhækking, um hon er hægri enn hjá kappingarneytum okkara, medvirkandi til at gera kappingarføri verri, og tað hevur so aftur avleiðingar fyri føroyska búskapin. Hann er sterkur íløtuni, men lítið skal til at ávirka búskapin, so leingi sum hann bara hvílir á fiskivinnu.

Tí mugu vit aftur ásanna, at tað var spell, at politiski myndugleikin ikki kundi semjast um at lækka kostnaðarstigið í samfelagnum, so løntakarar av álvara merktu, at keypiorkan ikki minkaði, men tvørturímóti vaks, so tann vanligi løntakarin fekk tað eitt sindur rúmligari í tí dagliga!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rættleiðing til grein í Oyggjatíðindum

**Jóannes Dalsgaard**
*2.mai 2001*



Í Oyggjatíðindum tann 2. mai er grein undir yvirskriftini "Løgmaður fingið klagu um mentamálaráðharran". Í greinini verður m.a. skrivað: "Okkara upplýsingar ganga út uppá, at Jóannes Dalsgaard inkasserar slaka millión árliga fyri bæði størvini, men er bara ongantíð at síggja á landsskjalasavninum".

Sipað verður til, at mær tænastuliga er álagt at virka sum stjóri á Landsskjalasavninum, nú eingin stjóri er á stovninum, starvið blokerað og tí ikki kann verða lýst leyst. Hetta er ein fyribils skipan, sum vónandi skjótt fær enda.

Fyri góðan ordans skuld skal verða upplýst, at eg ikki fái løn fyri at røkja starvið sum leiðari av landsskjalasavninum.

Tað skal eisini verða upplýst, at eg eri á Landsskjalasavninum hvønn dag í vikuni. Skuldi tað borist mær frá, røkir annar embætismaður í Mentamálastýrinum uppgávu mína við atliti at savninum.

# Úrlatin og ílatin í útvarpinum

**Arnfinnur Thomassen**

Var burtur í haga leygardagin, tá ið jeg hoyrdi útvarpið. Hugfarsligt at hava okkara lógarfesta fjølmiðilin við ein góðveðurdag á trøðni í hægstu lembingartíð…

So komu ítróttartíðindini…

Høvuðsyvirskriftin var katastrofan hjá fuglfirðingum í Havn. Jeg hugsaði sjálvsagt – og tað mundu føroyingar flestur eisini hugsa um – 7-0 til havnarmenn. Men dekan fari, tá ið úrslitið varð kunngjørt endaði dysturin 3-2!

Jeg unni fuglfirðingum alt tað besta – eisini HB. Men hví skal Útvarpið vera so óluksáliga partískt?

VB var »úrlatið« og »avsmurt« í Havn. Teir taptu 4-1. Eitt havnarlið tapti 4-1 í Gøtu…MEN har var eingin »avsmurningur« og eingi »nakin krov«!!!

HB er sambært útvarpið Føroyameistari – uttan at hava leikt ein einasta dyst í landskappingini!!!

Jeg veit altíð, nær VB hevur vunnið ein dyst. Tá koma teir altíð seinast í ítróttatíðindunum! MEN hevur eitt havnarlið vunnið, so verður tað væl og virðiliga útbasunerað í ÚF! (»No news is good news«)

Tað nyttar óluksáliga lítið at tosa um útjaðara og útoyggjar, tá ið okkara megamiðil, Útvarp Føroya, ikki hugsar út um Eystnes og Stong!

# Yvirlýsing

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
*Tórshavn 01.05.2001*

í sambandi við at samráðingarnar við Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag eru slitnaðar.

Undirritaðu feløg skulu við hesum boða frá, at hóast partarnir so at siga als ikki hava tosað um sjálv lønarkrøvini, so avjøgrdu arbeiðsgevararnir at slíta samráðingarfundin og boðsenda semingsstovninum.

Fyri okkum er eingin ivi um, at hetta er tekin um, at arbeiðsgevararnir ikki hava áhuga í at royna at finna eina semingsloysn við samráðingum millum partarnar, og vit meta ikki tað tænir nøkrum av pørtunum, at annar samráðingarparturin soleiðis kastar frá sær áðrenn verulig gongd er komin á lønarsamráðingarnar.

Vit skulu í hesum sambandi vísa á, at tað er sera umráðandi, at limirnir í feløgum okkara neyvt fylgja galdandi sáttmála, eisini tá talan er um arbeiðstíðir, tí í einari støðu sum hesari, tá vandi er fyri arbeiðssteðgi, tá vísa royndir okkara, at ikki allir arbeiðsgevarar fult út halda galdandi arbeiðstíðir, hetta fyri at arbeiða undan rávøruna, áðrenn møguligur arbeiðssteðgur verður settur í verk.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum, á aðalfundinum ella í Vinnuhúsinum.

## Aðalfundur í Oljutinginum
## 16. mai 2001 í Norðurlandahúsinum

Vit bjóða limum okkara til aðalfund 16. mai kl. 18.00 í Norðurlandahúsinum.

**Skrá**

Kl. 18.00 Hvørji felags áhugamál hava føroyskar fyritøkur í oljuvinnuni, og hvussu røkka vit teimum?
Magni Arge/Malan Johannesen, Oljuvinnufelagið

Kl. 18.20 Spurningar

Kl. 18.30 Val av fundarstjóra.
Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári.
Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi.
Val av nevnd
Val av grannskoðara
Ymiskt

Kl. 20.30 Ábit

Vinarliga melda til í Vinnuhúsinum á telefon 311864 - ella um teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi mánadagin 14. mai.

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

TK Stovan

## Kunningarfundur:
## Krøv til ein veitara á "World Class" støði

**Mánadagin 7. mai kl. 13.00 á Hotel Føroyum**

Krøv til veitarar, sum vilja gera seg galdandi uttanlands og her heima

TK Stovan skipar fyri kunningarfundi um krøvini til ein "World Class" veitara, og tekur sum dømi um krøv herheima, Atlantic Supply Base, sum fer at kunna um, hvørjar treytir og krøv, teir seta sínum veitarum.

Tiltakið er bæði fyri fyritøkur innan oljuvinnu og aðrar fyritøkur.

Kristian Stokbro, aðalráðgevi hjá Dansk Industri kemur við útgangsstøði í donskum viðurskiftum at røða um, hvørji krøv verða sett veitarum, nú og í framtíðini. Hann kemur inn á nógv hugtøk, tíðarrák, dømir og hvussu tú kanst tryggja tær at verða í fremstu røð sum veitari í framtíðini.

Lassi Borðoy, nýliga settur stjóri á veitingarstøðini á Skálafjørðinum, Atlantic Supply Base (ASB), kemur at røða um, hvørji krøv útgerðahavnin kemur at seta sínum veitarum. Hann kunnar eisini meira alment um ASB.

Fundurin er býttur upp, soleiðis, at Kristian Stokbro greiðir frá sínum evnum í tríggjar tímar. Eftir hann greiðir Lassi Borðoy frá ASB í ein góðan hálvan tíma. Møguleiki verður at seta spurningar og fyri stuttum tjaki.

**Skrá fyri fundin:**

**Kl. 13:00** TK Stovan bjóðar vælkomin
**Hvussu verður tú ein "World Class" veitari?**
**v/Kristian Stokbro, chefkonsulent, Dansk Industri:**
**Kl. 13:10** Hvar er kappingarstyrkin hjá fyritøkuni?
**Kl. 13.25** Hugsa tær, at ein "stór-kundi" kemur á vitjan?
**Kl. 13.40** Luttakararnir fáa vitjan! Prát í smábólkum.
**Kl. 13.50** Steðgur
**Kl. 14:05** Bólkaprát og kjak
**Kl. 14.30** Krøv til veitararar á World Class støði
**Kl. 14.40** Outsourcing – at leggja virksemi uttanfyri fyritøkuna
**Kl. 14.55** Steðgur
**Kl. 15.10** Vit byggja eitt "World Class" hús
- Leiðsla
- Áhaldandi læring
- Áhaldandi betranir og at arbeiða í toymi (teams)
- Tær røttu og feilfríu vørurnar
- Logistik – mannagongdir í samband við vørur og upplýsingar
- Útnyttan av framleiðsluorku
- Hvussu kemur fyritøkan víðari

**Kl. 16.00** Steðgur
**Krøv til veitarar v/ Lassa Borðoy, stjóra á Atlantic Supply Base**
**Kl. 16:10** Kunning um Atlantic Supply Base, og hvussu teir koma at arbeiða
**Kl. 16:45** Spurningar og møguligt tjak
**Kl. 17:00** Liðugt

**Tilmelding:** TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo
**Kostnaður:** kr. 700,00 u/mvg
Tilmelding í seinasta lagi **fríggjadagin tann 4. mai k. 12.00**

Virkisnavn:________ Tal av luttakarum:________

Navn/Nøvn:________

Tlf:________ Fax:________

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

*STRANDFARASKIP*
*LANDSINS*



**KRANI TIL SØLU**

Slag: FASSI
Tons: 4,7
Við spæli

Áhugað kunnu ringja til Strandfaraskip Landsins á tlf 213046 ella 213061.

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

